HEILSANIR

Góði Jóhann
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum í dag. Her høvdu vit tað ógvuliga stuttligt. Vit eru góð við teg.
Ynskja hini á myndini

Góði Jóhann
Vit ynskja tær tillukku við degnum í dag. Vit eru so góð við teg. Eisini ein heilsan til Sakaris, Gunnrið og Bjartmar.
Omman og abbin í Porkeri

Góið Dávid
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 13. apríl. Ja, nú ert tú blivin ein stórur drongur, vit elska teg. Jesus pápi signi framtíð tína.
Ynskja omma, abbi og Hanna gumma

Snøft! snøft!....
Snøft!
Tillukku við degnum my man!
keep on rocking!
heilsan ein fan

Góða elskaða Lilja
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum 12. apríl.
Ynskja mamma, babba, Jóhan Bjartur og Torbjørn

Tillukku góði Fríði!
Stórasystir ynskir tær hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum 15 apríl. Eg gleði meg at síggja teg aftur tá eg komi heim aftur úr Danmark.
Muss og klemm stórasystir....

Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Mán. ❑ Týs. ❑ Mik. ❑ Hós. ❑ Frí.

Tekstur:

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn:
Bústaður:
Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<

TILTØK

Gudstænastur
Skírisdagur
Havnar kirkja: kl. 11.00, Sonja Klein og Bjarni Bæk, altarg., skriftamál kl. 10.40
Kl. 18.00, Sverri Steinhólm, altargangur
Vesturkirkjan: kl. 11.00, Heri Joensen og Bergur D. Joensen, altargangur
Vestmanna: kl. 11.00, altarg.,
Hósvík: kl. 17.00, altarg., Marjun Bæk
Haldarsvík: kl. 12.00, altarg.,
Hvalvík: kl. 17.00, altarg., Mogens Tilsted Christensen
Skála: kl. 11.00,
Skála: kl. 18.00, Jógvan Fríðriksson, altargangur
Sjóvar kirkja: kl. 12.10, altarg., Jógvan Fríðriksson Skála
Gøta: kl. 12.00, altarg., Martin R. Jacobsen
Fríðrikskirkjan: kl. 17.00 altarg., Martin R. Jacobsen
Glyvrar: kl. 11.00, altarg.
Søldarfjørður: kl. 18.00, altarg., Meinhard Bjartalíð
Gjógv: kl. 12.00, Messa, Emil Olsen
Funningur: kl. 17.00 Messa, Emil Olsen
Leirvík: kl. 12.00, altarg., Uni Næs
Fuglafjørður: kl. 18.00, altarg., Uni Næs
Christianskirkjan: kl. 11.00, altarg., Niels Pauli Danielsen
Kunoy: kl. 19.30, Hanus Simonsen. Sangløta fyri børn við ymiskari luttøku
Norðoya Vistarheim: kl.
Christianskirkjan: kl. 11.00, Lestur
Kirkjan á Kirkju: kl. 12.00, altarg.,
Hattarvíkar kirkja: kl. 17.00, altarg., Elsa Funding
Elduvík: kl. 12.00, altarg., Uni Næs
Skálavík: kl. 12.00, Jákup R. Hansen
Øravík: kl. 11.00, altarg., Jónsvein Bech
Hov: kl. 12.00, altarg., skriftarmál,
í Leiti: kl. 13.20, altarg., skriftarmál, Patrick de Neergaard
Sumba: kl. 12.00, Ólavur Rasmussen

Páskaaftan
Glyvrar: kl. 20,00, Páskaaftansgudstænasta

Páskadag
Havnar kirkja: kl. 11.00, Sonja Klein
Nólsoy: kl. 12.00, Hans J. Joensen, biskupur
Kaldbak: kl. 12.00, Bjarni Bæk
Argja kirkja: kl. 11.00, Bergur D. Joensen
Vesturkirkjan: kl. 11.00, Heri Joensen
Kirkjubøar kirkja: kl. 12.30, Bergur D. Joensen
Kollafjørður: kl. 11.00,
Vestmanna: kl. 17.00, Marjun Bæk
Sørvágur: kl. 12.00,
Miðvágur: kl. 18.00, David Johannesen

Brúdleyp

Í dag, mikudagin 12. apríl kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Rakul Rasmussen og Kristian Niclasen. Veitsla verður í leguhúsinum í Nesvík kl. 19.00.

14. apríl kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni, Rúna Jóanesardóttir Dalsgarð og Jakob Jónsson. Veitslan verður hildin í Sjónleikarhúsinum fyri innbodnum.

Brúdleypið hjá Hjarnar Krog Dalsgaard og Rúnu Axelsdóttir Skoubo, ið skuldu verða 29. oktober 2005, verður 29. apríl 2006. Tey, ið hava fingið innbjóðilsi til brúdleypið og vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 18. apríl á tlf. 317674 ella 261056.

Leygardagin 6. mai kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni Jastrid Andreasen, Klaksvík og Oddmar Niclasen, Froðba. Døgurðin verður fyri innbodnum í Skálanum kl. 17.30. Vælkomst verður í Skálanum frá kl. 22.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin at siga frá áðrenn 30. apríl á tlf. 457002 ella 268751.

Leygardagin 6. mai kl. 16.00 giftast í Hósvíkar kirkju, Judith Joensen, Hvannasund og Dánjal Petur Olsen, Hósvík. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 23. apríl á tlf. 422507, 586577, 452018 ella 215507.

Leygardagin 6. mai kl. 15.00 giftast í Leirvíkar kirkju, Saloma Jóhannesen, Leirvík og Rúni Petersen, Fuglafjørður. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá áðrenn 29. apríl á tlf. 227257 ella 443210. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00.

Leygardagin 13. mai kl. 15.00 giftast í Vestmanna kirkju Maibritt Trondesen og Hjalmar Ingebrigtsen, Válur. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 30. apríl á tlf. 424751, 223991 ella 21551.

Leygardagin 10. juni kl. 14.00 giftast í Betania í Porkeri, Sigrid í Skemmuni, Porkeri og Gimme Andreassen, Vágur. Veitslan verður í skúlanum í Porkeri kl. 18.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin at siga frá áðrenn 20. mai á tlf. 373759/373287.

1. Juli giftast í Miðvágs kirkju Laila Nattestad og Kári Jacobsen, Miðvágur. Vígslan verður kl. 16.00 og veitslan verður í Bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá, áðrenn 12. juni á tlf. 333346, 220296, 332538, 332302.

Silvurbrúdleyp
Tann 8. mai 2006 hava Victoria og Sjúrður Absalonsen á Viðareiði silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin á Hotel Norð, fríggjadagin 12. mai (dýra biðidag) kl. 19.00. Tey, ið ynskja at koma í silvurbrúdleypsveitsluna, kunnu tekna seg við at ringja á 252573, best eftir kl. 18.00. Freistin at tekna seg er 1. mai.